SPEKT | statsaut.
revisorar

ARKIV

Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur fyri 2005

Correspondent Firm of
KPMG International
a Swiss Cooperative

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

Heiðavegur 15 · Postboks 190
FO-600 Saltangará · Faroe Islands
Telefon +298 474 474
Telefax +298 474 475

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin	3
Ársfrágreiðing	5
Roknskaparátekning leiðslunnar	7
Grannskoðanarátekning	9
Nýttar roknskaparreglur	10
Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2005	11
Fíggjarstøða 31. desember 2005	12
Notur	14

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon 35 35 80
Telefaks 35 35 81

Roknskaparár nr. 1

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Elisabeth Eldevig, formaður
búskaparfrøðingur

Bjørn á Heygnum
advokatur

Eyðun á Rógvi
cand. oecon.

Marion á Lakjuni
cand.polit.

Óluva J. Midjord
yrkislærd búnaðarkvinna

Varalimir:

Durita Eliasen
búskaparfrøðingur

Katrina Maria Johannesen
løgfrøðingur

Niels Th. Pedersen
maskinmeistari

Jónfinn Thomsen
advokatur

Jóannes Patursson
bóndi

Stjórn

Sjúrður Knudsen

Grannskoðan

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f
Correspondent Firm of *KPMG* international

Peningastovnar

P/F Føroya Banki
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
Landsbankin

Ársfrágreiðing

Virksemi

Lógin um Búnaðargrunn kom í gildi 31. desember 2004 samstundis sum Lov nr. 174 frá 24. mai 1937 um Jordbrugets Fremme við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 134 frá 20. august 1997 um grunn fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu við seinni broytingum fóru úr gildi.

Roknskapurin fyri 2005 er sostatt tann fyrsti, sum Búnaðargrunnurin letur frá sær.

Sjálvt um hetta er fyrsti roknskapur, sum Búnaðargrunnurin letur frá sær, verða tølini sammett við árið fyri. Tølini frá árinum fyri stava frá Føroya Jarðargrunni og av tí at virksemið tá stórt sæð var tað sama sum nú, meta vit tað vera í lagi at samanlíkna tølini.

Endamál Búnaðargrunnsins er at veita lán til landbúnaðin og at figgja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna) sambært løgtingslóg nr. 21 frá 17. mai 2004 um Búnaðargrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 30. apríl 2007.

Herumframt umsitir grunnurin festikontur og kontur fyri mist vetrarbit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslitið

Inntøkurnar í 2005 eru 7.707 tkr., og er hetta 329 tkr. minni enn árið frammanundan. Leiguinntøkur, inntøkur av lánsbrøvum, renta av eftirstøðum og renta av innistandandi peningi, eru allar vaksnar nakað, meðan rentuinntøkur av útlánum eru minkaðar við 822 tkr. Hetta skyldast fyri størsta partin, at onkur stórur skuldari hevur útgoldið lánið og at okkurt byggilán er umfiggjað partvíst av festikonto.

Úrslitið áðrenn avskrivingar og avsetingar er 2.559 tkr. í móti 3.438 tkr. í 2004 og er sostatt 879 tkr. minni enn árið frammanundan. Broytingin kemur m.a. av, at inntøkurnar eru nakað minkaðar og umleggingar í samband við at Búnaðarstovan flutti til Kollafjarðar. Eisini hevur fyrrverðandi stjórin arbeitt hálva tíð alt árið 2005 sum konsulentur. Tað, at Búnaðargrunnurin og Búnaðarstovan nú eru tveir stovnar, og at alingin er løgd undir Búnaðarstovuna, hevur eisini gjørt umsitingina eitt sindur dýrari.

Eisini eru ymiskar periodiseringar so sum løgfrøðilig hjálp o.l. eleraðar við ársskiftið í samband við at tað nú eru tveir stovnar.

Samlaða avsetingin móti tapi er nú 62.125 tkr. móti 61.700 tkr. árið fyri. Broytingin kemur av, at Grunnurin fyri Vakstrarhús og Grønmetisframleiðslu er lagdur undir Búnaðargrunnin og vóru 425 tkr. avsettar her frammanundan.

Stýrið metir at samlaða avsetingin móti tapi uppá 62.125 tkr. er nóg stór. Arbeitt hevur verið við at gjøgnumganga hvørt lán sær fyri at meta um tapsvandan; hetta arbeiði er fingið frá hondini í 2006, og verða møguligar broytingar innarbeiddar í ársroknskapin fyri 2006

Lánsbrøvini eru hækkað úr 93 mió. kr. upp í 124 mió kr. Hetta er gjørt fyri at fáa eitt betri avkast við tí lækkandi innlánsrentuni og fyri at økja um trygdina. Her verður m.a. hugsað um innsetaratrygdargrunnin.

Grunnurin er vaksin úr 85 mió. kr. til 92 mió. kr. Hetta kemur av rakstraravlopinum upp á 2.461 tkr. og 4.845 tkr., sum var eginognin hjá Vakstrarhúsgrunninum.

Festikontan er vaksin úr 133 mió. kr. til 145 mió. kr. Hækkingin stavar frá vanligari jarðarsølu, umframt at Tórshavnar Kommuna hevur keypt ídnaðarøkið á Sandvíkarhjalla fyri 4.460 tkr. og at Runavíkar Kommuna hevur vetrarfriðað fyri 2.614 tkr

Onnur skuld er hækkað úr 1.142 tkr. til 2.453 tkr. og er sostatt hækkað við 1.311 tkr. Hetta stavar m.a. frá ávegisgjøldum fyri jarðarsølu v.m. Afturat hesum eru skyldugar útreiðslur fyri raksturin av Búnaðarstovuni uppá 2.423 tkr., sum verða goldnar einaferð um árið. Í 2005 eru ikki sundurgreinað inngjøld av jarðarkeypi á 865 tkr. flutt frá onnur skuld til festikontuna.

Sjálvt um lánsbrøvini ikki hava givið líka gott avkast seinastu árini sum tey fyrstu árini frá 2001, tá ið byrjað var at seta í lánsbrøv, má samanumtikið sigast, at tað hevur verið ein góð loysn at keypa lánsbrøv.

Í 2004 avgjørdi MBM, at mjólkarkvoturnar skuldu vera umsetiligar, soleiðis at mjólkaframleiðari fekk møguleika av avhenda kvotuna ella partar av henni við at selja ella leiga. Hetta økir sjálvsagt um møguleikarnar fyri færri og størri fjósum, men setur eisini størri krøv um at stráfóðurgrundarlagið er til staðar.

Ein møguligur trupulleiki, sum hevur tikið seg upp við umsetiligum kvotum er, at tá ið kvota verður keypt ella leigað, má hon sjálvsagt figgjast onkusvegna. Um skuldin ikki verður niðurgoldin samsvarandi hjá tí sum selur, hækkar samlaða íløgan/skuldin í mjólkavinnuni, samstundis sum grundarlagið verður tikið undan fjósinum sum selur, av tí at mjólkarframleiðslan her heldur uppat.

Við tað at kvoturnar eru persónligar og ikki fylgja festinum, kann hetta kann gerast ein stórur trupulleiki, sum eigur at vera tikin upp politiskt.

Nýggja lógin um landsjørð kemur væntandi at betra um hesi viðurskifti við tað at festibrævið kann veðsetast og at møguleiki verður at seta ognir, sum festarar fáa møguleika at keypa, í veð.

Stýrið metir hesar lógir vera eitt stig á leiðini at fáa betri skipað viðurskifti fyri landsjørðina.

Búnaðargrunnurin hevur framvegis ta áskoðan, at festiskipanin forðar fyri, at ábyrgdarbýti millum bónda og fyrisiting er nóg greitt og metir at bóndin skal hava fulla ábyrgd av garðinum eins og onnur vinnurekandi hava av síni fyritøku.

Mælt verður tí til at festiskipanin verður avtikin, og at bóndir sjálvir eiga garðarnar.

Mjólkneytahaldið í Føroyum stendur á einum vegamóti. Flestu fjósini eru yvir 20 ára gomul og treingja til stórar ábøtur ella at nýggj fjós vera bygd í staðin.

Eins og aðrastaðni uttan um okkum tykist tað vera neyðugt, at fjósini vera munandi størri enn tey eru í dag.

Neyðugt er tí at taka støðu til hvussu stór hesi nýggju fjósini skulu vera, hvar í landinum tey skulu vera og hvussu nógv skal veltast úr nýggjum.

Spurningurin um samanlegging av festum ella samstarv millum festarar um felagsfjós verður eisini neyðugur at viðgera og taka støðu til.

Studningar

Ein av uppgávunum hjá Jarðargrunninum/Jarðarráðnum var at umsita tær stuðulskipanir, sum peningur var játtaður til á løgtingsfiggjarlógini.

Tá ið nýggja lógin um Búnaðargrunn varð sett í gildi 31. desember 2004, var hendan uppgávan áløgd Búnaðarstovuni.

Peningaviðurskifti

Fíggjarjavnin er 204.210 tkr. Av hesum er eginpeningurin 236.760 tkr., sum svarar til 98,6%.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparásetingar. Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn hin 5. juli 2007
Stjórn:

Sjúrður Knudsen

Stýrið

Elisabeth Eldevig *formaður*	Bjørn á Heygum *næstformaður*	Eyðun á Rógvi
Marion á Lakjuni	Óluva J. Midjord	

Góðkendur á fundi Stýrisins, hin / 2007

Fundarstjóri:

Grannskoðanarátekning

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2005.

Leiðslan í grunninum hevur ábyrgdina av ársroknskapinum. Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin.

Grannskoðanin

Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum. Hesar reglur krevja, at vit leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum. Tá ið vit grannskoða, kanna vit við stakroyndum grundarlagið undir upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Vit taka eisini støðu til nýtta roknskaparháttin og týðandi roknskaparligu metingarnar, ið leiðslan hevur gjørt, og somuleiðis, hvussu roknskapurin sum heild er gjørdur. Tað er okkara fatan, at grannskoðanin er eitt nøktandi grundarlag at byggja okkara niðurstøðu á.
Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum og figgjarligu støðu 31. desember 2005 og av úrslitinum av virksemi grunnsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2005 samsvarandi nýttu roknskapar-reglunum.

Tórshavn hin 5. juli 2007
SPEKT statsaut. revisorar Sp/f

Miriam Haraldsen
statsaut. revisor

Danial í Skemmuni
grannskoðari

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin er gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum eru lýstar niðanfyri.

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í ársroknskapin so hvørt, rokningar verða goldnar. Fyri at fáa allar rokningar við, sum viðvíkja árinum, var kassin hildin opin til 1. mars 2006.

Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán og eftirstøður verða upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av samlaðari niðurskriving ímóti tapi.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi.

Lánsbrøv

Lánsbrøv verða upptikin til kursvirði við ársenda.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 2005

	Nota	2005
		kr.
Leiguinntøkur, netto	1	123.169
Rentuinntøkur v.m.	2	7.325.498
Sakarmálsgjøld		257.840
Inntøkur til samans		7.706.507
Umsiting	3	-587.761
Húsarakstur	4	-168.284
Starvsfólkaútreiðslur	5	-1.945.783
Innbúgv v.m.	6	-23.060
Búnaðarstovan		-2.422.362
Úrslit áðrenn avskrivingar og avsetingar		2.559.257
Avsett til tap upp á skuldarar		0
Aðrar avsetingar		-98.648
Ársúrslit		2.460.609

Fíggjarstøða 31. desember 2005

	Nota	2005
		kr.
OGN		
Støðisogn		
Materiell støðisogn		0
Støðisogn til samans		0
Ogn í umferð		
Áogn		
Útlán og eftirstøður	7	70.129.609
Onnur áogn	8	299.675
		70.429.284
Lánsbrøv		123.750.150
Tøkur peningur	9	46.030.524
Ogn í umferð til samans		240.209.958
OGN TIL SAMANS		240.209.958

Fíggjarstøða 31. desember 2005

	Nota	2005
		kr.
SKYLDUR		
Eginpeningur		
Grunnurin	10	92.371.026
Festikontur	11	145.237.355
Kolagrevstrargrunnurin		16.803
Eginpeningur til samans		237.625.184
Skuld		
Stuttfreistað skuld		
Onnur skuld	12	2.453.091
Ikki útgoldin studningur	13	131.683
Skuld til samans		2.584.774
SKYLDUR TIL SAMANS		240.209.958
Eventualskyldur og veðsetingar	14	

Notur

1 Leiguinntøkur

	2005
	kr.
Festileiga	26.831
Traðarleiga	79.338
Festigjøld við skifti	17.000
	123.169

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	2.644.325
Rentur og kursjavningar av lánsbrøvum	2.962.987
Rentur av innistandandi peningi o.a.	938.733
Rentur av eftirstøðum	779.453
	7.325.498

3 Umsiting

Veðhavaralýsingar	-800
Løgfrøðilig hjálp	56.763
Serkøn hjálp	152.348
Postgjald	13.608
Aðrar skrivstovuútreiðslur	85.690
Grannskoðan	70.500
Roknskaparhjálp v.m.	35.600
Trygging	21.037
Tinglesing	3.358
Námsferðir	1.688
Edv-útreiðslur	8.129
Bókaútgáva	-1.329
Telefon	37.069
Internet	21.078
Ymiskt	73.289
Haldaragjald, bløð o.a.	9.733
	587.761

Notur

4 Húsarakstur

	2005
	kr.
Viðlíkahald	400
Reingerð o.a.	34.163
Ljós og hiti	21.480
Urtagarðurin	98.502
Ávaringarskipan	7.136
Húsavarðatænastan	6.603
	168.284

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	1.392.667
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	14.227
Arbeiðsloysistrygging	17.349
Barsilsskipanin	5.560
Eftirlønargjald	143.414
Lønir og lønargjøld tilsamans	1.573.217
Dagpeningur, Ráðið	352.499
Ferðapeningur, Ráðið	20.067
	1.945.783

6 Innbúgv v.m.

Innbúgv	23.060
Telduútgerð	0
Skrivstovuútgerð	0
	23.060

Notur

7 Útlán og eftirstøður

Ymiskar útlánskontur	104.153.265
Avdráttir og rentur, fallin til gjaldingar	28.087.807
Fallin festi- og traðarleiga	13.537
Avsett til tap	-61.700.000
Avsett til tap, frá vakstrarhúsgrunninum	-425.000
	70.129.609

8 Onnur áogn

Mvg-áogn	143.769
Onnur áogn	155.906
	299.675

9 Tøkur peningur

	2005
	kr.
Kassapeningur	1.299
P/F Føroya Banki	27.604.041
EIK Banki	9.402.926
Suðuroyar Sparikassi	115.672
Norðoya Sparikassi	3.818.876
Landsbankin	4.865.659
Postgiro	222.051
	46.030.524

10 Grunnurin

Salda 1. januar	85.065.300
Eginogn frá Vakstrarhúsgrunninum	4.845.117
Rakstraravlop	2.460.609
	92.371.026

Notur

11 Festikontur

Salda 1. januar	132.786.628
Søla av jørð	8.676.460
Inngoldið fyri vetrarbit	3.685.106
Inntøka av grótbrotum	767.754
Frábýtisútreiðslur	-4.689
Leiga	109.736
Alistøðir	534.666
	146.555.661
Útgoldið, netto	-2.183.043
Ikki sundurgreinað inngjøld	864.737
	145.237.355

12 Onnur skuld

	2005
	kr.
Brunatrygging	2.084
Skyldugar útreiðslur	2.422.683
Avsett til eftirlønargrunn	12.679
Serkøn hjálp	15.645
	2.453.091

13 Ikki útgoldin studningur

Seyðakjøtstudningur	2.536
Mjólkastudningur	129.147
	131.683

14 Eventualskyldur og veðsetingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum.